Arbeiðseftirlitið

Tórshavn, 15. mars 2011

# Krøv til plasttangar til goymslu av dieselolju.

## Plasttangar til vanlig sethús.

Heimildargrundarlagið er kunngerð um eldfiman løg nr. 94 frá 15. juni 1994, § 6, og §§ 10, 11, 25 og 26.

Í sambandi við sølu av plastangum verður biðið um skjøl – databløð – ið lýsa, hvønn tanga talan er um, um uttanlanda sniðgóðkenningarskjøl, nummar og framleiðslustað, garanti o.t. soleiðis at Arbeiðseftirlitið hevur møguleika at fylgja útbreiðsluni av plasttangum, ið vit meta skulu handfarast sera varisliga í sambandi við brunatrygd.

Viðv. uppstilling av plasttanga **úti**:

- Plant berandi tætt undirlag, sum í minsta lagi skal vera 10*cm* út um tanga.
- Tangi skal í minsta lagi vera 2,5*m* frá marki (grannamarki)
- Partar av bygningi á egnum grundøkið, har tangi er nærri enn 2*m* frá útveggi, skal útveggur í minsta lagi verða BD-30 (REI 30 ella EI 30) við í minsta lagi klæðing úr flokki 1 (K 10 B-s1,d0).
- Tangi skal í minsta lagi vera 2*m* frá úrsparingum (hurðar vindeygu v.m.) uttan so, at hesi í minsta lagi eru BD-30 ($EI_2$ 30-C, REI 30 ella EI 30). Annars kann eldforðandi verjuveggur (flammuskermur) sambært S.F.-eldfiman løg, gerast í staðin.
- Ansast skal eftir at tangin verður vardur móti fysiskari kontakt og ákoyring (veggur, garður v.m.)
- Einkultveggjaðir plasttangar skulu verjast móti leka (uppsamlingstangi, uppsamlingsbakki ella serligar oljuídrekkingsmáttur).

Viðv. uppstilling av plasttanga inni:

- Krevjast heilt serlig byggilig atlit í hvørjum einstøkum føri.

*Sí eisini (S.F.-eldfiman løg) Serfyriskipanir fyri eldfiman løg frá 15. juni 1994, stk. 4.11.2 og stk. 4.11.4*